# Ov nógv mistøk

**Rannvá Augustinussen hjá VB helt, at tær á degnum høvdu gjørt ov nógv mistøk til at vinna dystin**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Vit kláraðu ikki at halda høvdið kalt. Vit skutu ov nógv og ov býtt, og tað kostaði okkum dystin – og gullið. Eg haldi ikki, at nervarnir vóru ov nógvir, men tað hava teir so kanska verið kortini.

Somikið greið var Rannvá Augustinussen, tá vit eftir tapta gulldystin leygardagin fingu orðið á hana.

Soleiðis sum dysturin háttaði sær, so er tað eingin loyna, at tað var Stjørnan, sum betri megnaði at halda høvdinum køldum, men hartil, so helt Rannvá eisini í vónbrotinum, at VB ikki hevði tikið dystin rætt.

– Vit høvdu sera ilt við at fáa frið á spælið. Støðuga skiftið millum 5-1 og 6-0 gjørdi, at vit ikki høvdu tíð at fella niður. Vit høvdu annars skjúttarnar hjá teimum sera væl í 5-1 verjuni, og kanska skuldu vit hildið meira fast um hana. Hartil fingu vit ongan tíð skjótálopini at koyra. Tað hevur annars verið ein av stóru styrkjunum hjá okkum, men tað riggaði so heldur ikki, staðfesti hon.

Hóast ein dystur framvegis er eftir, so er einki at ivast í, at VB'arnir kenna tað, sum er kappingarárið liðugt fyri teirra viðkomandi.

Og tað tykist heldur ikki bøta um lagið, tá vit at enda spyrja Rannvá, hvørt tað nú berte er at bíða, og so aftur koyra á um hálvt ár ella so.

– Hvar skal eg koyra á. Vit hava ikki ein gongd eitt stað at venja, so í løtuni veit eg slettis ikki, sigur hon at enda, og sipar her til umstøðurnar, sum nakrar av VB-kvinnunum hava. Rannvá sjálv og Laila Jespersen búgva nevnliga í Havn, og her hava tær ikki møguleika at venja saman við liðfeløgunum, og heldur ikki hevur tað eydnast at sloppið upp í part í venjingunum hjá nøkrum av havnarfeløgunum.



*Ov nógv mistøk, ov nógv skot og ov býtt skot. Tað var stutta niðurstøðan hjá Rannvá Augustinussen eftir tapið leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Høll millum havnarfeløgini



*Her er ætlanin, at HB og B36 skulu byggja hús, sum millum annað skal rúma einum innandura venjingarvølli*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Gongst eftir ætlan fara HB og B36 at gera fótbóltshøll millum húsini bæði. Ovara hæddin skal útleigast til fimleikin**

HALLARBYGGING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu afturi í 1999 høvdu tey bæði stóru havnarfeløgini í fótbólti ætlanir um at byggja á økinum millum bæði felagshúsini. Ta ferðina var ætlanin, at ein fótbóltshøll skuldi gerast í neðra, meðan ovara hæddin skuldi leigast út til bowling-høllina, sum tá varð fyrireikað, men hendan ætlanin varð tó av ongum. Fyrst og fremst tí Býráðið av ymsum ávum ikki vildi veita stuðul til byggingina.

Síðani tá hava hesar ætlanir ligið fjaldar í onkrari skuffu, men nú er líkt til, at pappírini eru tikin fram aftur, og hesa ferð tykist sannlíkt, at ætlan gerst til veruleika.

### 8 mió kr.

Á seinasta aðalfundinum hjá B36 greiddi Kristian á Neystabø, formaður, frá, at feløgini aftur vóru farin at umhugsa møguleikarnar í einum slíkum projekti, og sum skilst, so er nú eisini líkt til, at Býráðið vil vera ein aktivur viðleikari hesaferð.

Mikukvøldið skal Mentanarnevndin hjá Býráðnum taka støðu til eina umsókn um stuðul til ein kombineraða fótbólts- og fimleikahøll millum húsini bæði, og sum skilst, so er talan um væl størri vælvild hesaferð.

Kristian á Neystabø sigur, at tey í feløgunum enn hava arbeitt mest út frá gomlu ætlanunum, men at ávísar tillagingar tó eru gjørdar í hesum.

– Sum tað liggur nú, so verður talan um eina høll við einum graslíksvølli í niðaru hæddini, meðan ovara hæddin verður ein fimleikarhøll, sum Havnar Fimleikafelag ætlandi skal leiga. Enn hava vit so ikki gjørt endaligu projekteringina klára, tí vit vilja fyrst hava tilsøgn frá Býráðnum, men verður hetta viðgjørt positivt, so er ætlanin at fara ígongd alt fyri eitt.

Víðari sigur Kristian, at samlaði kostnaðurin av ætlanini helst fer at tátta í átta mió kr. Ætlandi skulu landið og Tórshavnar Kommuna lata 30% hvør í stuðuli, meðan restin verður fíggjað av teimum báðum fótbóltsfeløgunum. Møguliga umvegis eitt partafelag, sum feløgini so skulu seta á stovn.

### Meira til onnur

Sambært reglugerðini fyri HatTrick grunnin hjá UEFA, so skal ein partur av hesum eisini nýtast til menningarprojekt við sonevndum mini-fótbóltsvøllum, og Kristian viðgongur, at hetta eisini er ein møguleiki at fáa fígging til verkætlanina, men at feløgini sum sagt hava bíða við at nýta meira orku til ætlanina, fyrr enn tilsøgnin frá Býráðnum er fingin til vega.

Verður ætlanin veruleiki, fer hetta at merkja, at fótbóltsfeløgini framyvir fara at hava sínar innanduravenjingar í egnari høll, og átti hetta eisini at komið øðrum ítróttargreinum til góðar. Tey bæði feløgini hava sum er 16 tímar um vikuna í Ítróttarhøllini á Hálsi, og kunnu hesir soleiðis leysgevast til onnur at nýta. Og lítið er at ivast í, at tað ikki trýtur við avtakarum til hesar tímarnar.

# Ongar nervar

**Hóast Alina Olaru skuldi skjóta kanska týdningarmesta brotskastið á árinum, so helt hon ikki, at hetta var nakað, sum nervaði stórvegis**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein minuttur og 17 sekund vóru eftir á klokkuni, tá dómaraparið dømdi brotskast, eftir at Anna Kristina Samson varð tikin í gjøgnumbrotsroynd.

Við støðuni 23-25 á talvuni var hetta løtan, sum uttan iva kundi senda meistaraheitið til Klaksvíkar, men sum hinvegin eisini kundi geva VB eina seinastu vón, um royndin varð misnýtt.

Umstøðurnar høvdu ivaleyst verið nóg mikið til at givið fleiri leikarum kaldar føtur, men ikki Alinu Olaru hjá Stjørnuni. Hon fór púra køld fram til strikuna, og úr sjey metrum staðfesti hon, at Stjørnan í ár eigur besta kvinnuliðið í landinum.

Eftir dystin hittu vit Alinu, og spurd um júst brotskastið segði hon, at hon als ikki var í iva.

– Fleiri spurdu meg, um eg ikki hevði nervar, men tað hugsaði eg ikki um. Heldur ikki um týdningin, sum hetta kastið hevði. Fyri meg var hetta eitt brotskast eins og øll onnur. Onkra tíð skorar tú og onkra tíð ikki.

### Hart arbeiði

Somikið einfalt kann tað altso vera at ogna sær eitt meistaraheiti í hondbólti, men var meistaraheitið og steypasigurin nakað, sum Alina hugsaði um, tá hon í vetur gjørdi av at skifta hondbóltstilveruna á Skála um við eina í Klaksvík.

– Sjálvandi var onkur, sum tosaði um greipuna, men eg visti í øllum førum, at tað fór at verða hart. Hart arbeiði, har allar eru við hvørja tí einastu ferð, skuldi til, og tann partin hava vit livað upp til. Tað gevur seg eisini aftur í dystum, tá nógv stendur á, tí vit eru allar til reiðar at stríðast fyri hvørjari aðrari.

*Men tá tað so kemur til ein slíkan dyst, har alt árið skal avgerast yvir 60 minuttir. Koma tað ikki eitt sindur av nervum upp í spælið tá?*

– Jú, kanska áðrenn. Men tá dysturin fyrst er byrjaðu, so spælir tú bara. Tá hugsar tú ikki um klokkuna ella annað, segði Alina Olaru at enda. Leikarin, sum kanska var avgerandi fyri meistaraheitið, og sum í øllum førum gav Stjørnuni ein stóran trumf til endaspælið.



*- Fyri meg var hetta eitt brotskast eins og øll onnur. Onkra tíð skorar tú og onkra tíð ikki, vóru einføldu boðini frá Alinu Olaru eftir kastið, sum við 100% vissu staðfesti meistaraheitið hjá Stjørnuni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# So kom fimta gullmerkið



*- Eg hevði alla tíðina varhugan av, at slakaðu vit bara tað allarminsta, so mistu vit alt aftur, sigur Una um løtuna, tá flestu áskoðararnir mundu halda, at meistaraheitið hjá Stjørnuni var víst*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Una Olsen hevur síðani juli mánað vunnið fimm gullmerki. Hóast gleðin hevur verið stór hvørja ferð, so helt hon tó leygardagin, at hetta var tað av teimum fimm, sum kravda nógv tað harðasta arbeiðið**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum vit skrivaðu í leygardagsblaðnum, so høvdu tvær av leikarunum hjá Stjørnuni møguleikan at vinna sítt fimta gullmerkið innan minni enn eitt ár.

Onnur teirra var liðskiparin á liðnum, Una Olsen. Sum vera man, so var frøin stór, nú hon fyri fimtu ferð síðani í summar kann gera seg til reiðar at taka ímóti einum gullmerki, og tá vit spurdu hetta, hvørt hetta eisini var tað strævnasta at heinta, ivaðist hon ikki eina løtu.

– Og so nógv tað strævnasta. Steypafinalan var sjálvandi eisini strævin, men har var tað yvir ein einstakan dyst. Hetta er vunnið yvir eitt kappingarár, og tað krevur nakað væl meira.

### Ikki endurtaka mistøkini

Fyrra hondbóltsgullið á árinum kom til høldar, tá Stjørnan vann steypafinaluna á VB, og Una segði eftir dystin, at finalan móti VB eisini var nakað, sum tey høvdu við í fyrireikingunum.

– Vit tosaðu nógv um, at vit ikki endurtóku mistøkini, sum vit tá framdu. Serstakliga tað, at vit komu so seint í gongd ta ferðina.

– Hóast hetta, so gekk tað sera striltið hjá okkum fyrstu løtuna, og var tað ikki fyri Lidiu, so kundi tað gingið heilt galið. Vit komu tó aftur, og sjálvt um vit vóru tvey mál aftan fyri í steðginum, so nervaði tað okkum als ikki. Tvey mál eru púrasta einki í hondbólti, og vit trúu fult og heilt upp á møguleikan, tá vit komu út til seinna hálvleik.

Tað vísti seg so eisini at ganga hjá Stjørnuni, men hóast leiðslan tóktist trygg seinastu fimm minuttirnar, so helt Una sjálv, at hon ikki kendi sigurin vísan, fyrr enn seinasta bríkslið hevði ljóðað.

– Kanska roknaði eg við tí, tá Lidia tók hatta brotskastið, men eg veit ikki. Spenningurin var so stórur, og eg hevði alla tíðina kensluna av, at um vit slakaðu, so mistu vit alt aftur. Tað mátti ikki ganga galið, og tað gjørdi tað so tíbetur heldur ikki, segði hon smílandi.

### Hugni á skránni

Og smílið stendur eisini við, tá tosið fellur inn á komandi vikuna. Ein vika, sum skal enda við heimadysti móti Neistanum, har ein stúgvandi full KÍ-høll væntandi fer at heiðra Stjørnuni. Og nú gullið er tryggjað, roknar Una eisini við, at tann dysturin verður nakað lættari, enn hann annars vildi verið.

– Sjálvandi fara vit inn fyri at vinna. Tað gera vit hvørja ferð.

– Men tað verður nokk eitt meira hygg yvir spælinum nú, enn tað annars vildi verið. Tað sama rokni eg eisini við fer at galda fyri venjingarnar. Í øllum førum rokni eg við, at tað ikki verður talan um nakra straff-renning hesa vikuna, segði ein stórsmílandi Una Olsen at enda.



grafikari til sms

Søkt verður eftir grafikara at byrja sum skjótast.

Arbeiðsuppgávurnar verða fjølbroyttar. Tú fært eitt nú ábyrgdina av ymiskum grafiskum uppgávum hjá SMS og handlunum, sum SMS eigur.

Møguleiki er eisini fyri, at tú kemur at gera ávísar uppgávur fyri hinar handlarnar í húsinum. Eisini innanhýsis lýsingar- og upplýsingartilfar skalt tú greiða úr hondum.

Vit vænta, at tú hevur grafiska ella líknandi útbúgving, og hevur starvast sum grafikari í eina tíð og harvið hevur royndir at arbeiða sjálvstøðugt. Vit vænta somuleiðis, at tú dugir væl at málbera teg á føroyskum - bæði í skrift og talu, og at tú ert løtt/lættur í sinni.

Starvið er fulltíðarstarv. Tú skal vænta, at arbeiðstíðirnar verða ymiskar, og til tíðir kunnu væntast langir arbeiðsdagar. Løn sambært avtalu.

Av tí at starvið er nýtt, kemur tú at verða við at avgerða, hvør tekniskur útbúnaður verður keyptur, og hvussu deildin verður skipað.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 19. apríl, og skal sendast til:

**SMS**
**Postboks 1059**
**110 Tórshavn**
**viðmerk brævbjálvan "Grafikari"**.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Til ber at frætta meira um starvið við at ringja til Rógva Róin á tel. 21 98 88

SMS

SMS • Postboks 1059 • Tel. 31 30 41 • e-mail: sms@sms.fo • WWW.SMS.FO